# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Tórður Thomsen vandi í gjárkvøldið við AB, og her trokast hann og framherjin, Thomas Hans Rubeksen, sum vardi AB-málið síðstu løtuna í Runavík sunnudagin, tá Heðin Stenberg var farin út við skaða*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/ Einslistir*

# Tórður hjálpir argjamonnum

**Bráðfeingis loysnina upp á málmanstrupulleikan, nú Heðin Stenberg er skaddur, fann AB í Runavík. Leiguavtala er gjørd við NSÍ um, at AB fram til summarsteðgin skal hava Tórð Thomsen sum aftasta skansa í steypa- og landskappingini, nú Heðin Stenberg er úti við skaða**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá AB var og vitjaði í Runavík sunnudagin og vann 1-0 á NSÍ, var talan tó ikki um ein sigur uttan skeinur, tí ímóti dystarenda var málverjin, Heðin Stenberg, so óheppin í einum samanstoyti, at knæskelin fór úr lið. Hann var borin av vølli og beinanvegin koyrdur suður á Landssjúkrahúsið.

Av tí at AB hevði gjørt allar sínar skiftingar, mátti framherjin, Thomas Hans Rubeksen, fara í málmanstroyggju og handskar, og hann vardi málið so mikið væl, at tað ikki eydnaðist NSÍ fáa mál, hóast 11 minuttir vóru lagdir aftrat, áðrenn dysturin var bríkslaður av.

Tað var tó greitt, at Thomas Hans ikki var nøkur varandi loysn í málinum, og beinanvegin eftir dystin byrjaði arbeiðið at finna ein málmann, sum kundi verja málið fram til summarsteðgin, tá Heðin Stenberg væntandi er klárur aftur.

Nú er so greitt, at eins væl og skaðin hendi í Runavík, so var tað eisini har, hjálpin var at heinta, tí í gjárkvøldið kom ein loysn upp á pláss, so tað verður NSÍ-málverjin, Tórður Thomsen, ið skal vera aftasti skansi hjá argjamonnum næstu vikurnar. Hann var eisini í 2007 leigaður út til AB, men ta ferðina bara til tann eina dystin.

## Gott at koma í gongd

Tórður Thomsen stendur sostatt í málinum í annaðkvøld, tá AB í Streymnesi spælir seinnu hálvfinaluna í steypakappingini ímóti EB/Streymi, og annars verður talan um fimm dystir í Vodafonedeildini, til summarsteðgur er um ein lítlan mánað.

Sum skilst, hevur NSÍ í leigusáttmálanum tryggjað sær møguleikan at taka Tórð aftur, um NSÍ skuldi komið í ta støðu, at felagið sjálvt fær brúk fyri honum.

Tórður Thomsen er fegin um, at leiguavtalan er komin í lag, tí hon gevur honum møguleika at fáa ta dystarvenjing, hann ikki annars hevur havt so nógv av í ár.

– Nú gleði eg meg til at koma í gongd, og tað er bara super, at eg komi í eldin beinanvegin ímóti EB/Streymi, tí tað er fyri at fáa slíkar dystir, at tú venur og spælir, sigur Tórður, sum vardi málið hjá NSÍ alt kappingarárið í fjør, men tó ikki skrivaði undir sáttmála um hetta kappingarárið, tí hann ætlaði sær av landinum at spæla.

– Eg vildi ikki skriva undir við NSÍ, hóast eg hevði ein góðan sáttmála í boði, tí eg visti, at eg ikki fór at verða verandi. Men so kom heimskreppan og einki spurdist burturúr at fara uttanlands í hesum umfarinum.

## Í góðum formi

Fyri kortum gjørdi Tórður so eina avtalu við NSÍ fyri restina av kappingarárinum, og hann hevur eisini alla tíðina gjørt so mikið nógv við tað, at hann heldur seg vera væl fyri og í góðum formi, nú avbjóðingin á Argjum brádliga tók seg upp.

– Fyrrapartar havi eg vant saman við einum ungum málmanni og so havi eg vant styrkivenjing, umframt at eg um kvøldarnar aftur havi vant við NSÍ, so eg skuldi verið væl fyri, sigur málverjin, sum tó mátti binda frið í tríggjar vikur herfyri, tí hann hevði ein liðbandsskaða í knænum.

– Nú havi eg so verið til fyrstu venjingina á Argjum, og tað sær bara heilt spennandi út. Teir hava enntá ein málmansvenjara til hvørja venjing, og tað dámar mær væl. Eg havi spælt saman við fleiri av spælarunum á ungdómslandsliðunum, so eg kenni meg ikki so fremmandan her heldur.

## Svimjingin ivast um Oyggjaleikir

**Ítróttarliga avbjóðingin við Oyggjaleikum verður nú vigað móti kostnaðinum av at senda føroysku luttakararnar avstað**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin var aðalfundur í Svimjisamband Føroya hildin í ÍSF-húsinum.

Millum annað segði Jon Hestoy, formaður í Svimjisambandinum, soleiðis um kostnaðin av Oyggjaleikaluttøkuni.

- Tað er ein stórur trupulleiki at kostnaðurin av Oyggjaleikum er so høgur. Um Føroyar ynskja at vit skulu luttaka á einum størum felags ítróttatilfaki, sum Oyggjaleikir, so átti stuðulin at verið væl hægri. Tá vit í ár skulu gjalda út við 10.000 krónur fyri hvønn luttakara, so kann ein ikki lata verða við spyrja, hvat verður so kostnaðurin um fýra ár tá Oyggjaleikir verða á Bermuda. Svimjingin er noydd at taka spurningin upp um prísurin á luttøkuni í Oyggjaleikum er rímiligur í mun til ítróttaliga støðið, segði Jon Hestoy.

Oyggjaleikir, HM, EJM og EM á stutthylji fella øll sama ár og leggur stórar byrður á eitt sersamband sum Svimjisambandið.



*Formaðurin í Svimjisambandinum ivast í, um ítróttarligu avbjóðingarnar á Oyggjaleikalum standa mát við kostnaðin*